# Allan kvígir fyri várinum

*Landsliðsvenjarin heldur, at avrikið móti Liktinstein vísti, at fyritreytirnar eru vánaligar at spæla undankappingardystir tíðliga á árinum*






*Vinstrumegin:*
*Allan Simonsen var ikki sørt ovfarin av, hvussu vánalig venjingarstøðan hjá føroysku leikarunum var*

*Niðanfyri:*
*Julian Johnsson, í vanligum stíli, vinnur her luftbólt móti mótstøðuleikara*
***Mynd:***
***Lichtensteiner Vaterland***

Tað var ein lætti fyri Allan Simonsen, at liðið hjá honum basti Liktinstein. Venjarin fjaldi ikki á tíðindafundinum, at hann var fegin um sigurin, men annars dugdi hann ikki at síggja annað at fegnast um:

– Fyrri hálvleikur var út av lagi vánaligur. Í 2. hálvleiki hekk tað betur saman, men eg kann hvørki vera nøgdur við bóltførleikan ella fysisku støðuna. Komandi ár skulu vit í mars spæla undankappingardystir á útivølli móti Luksemburg og Russlandi. Avrikið móti Liktinstein vísti, at vit eru so langt í frá í tí venjingarstøðuni, sum skal til, um vit skulu standa okkum.

*Hvat ætlar tú at gera við tað?*

– Tað mugu vit tosa um. Best hevði tað verið, um vit, umframt venjingarleguna í Spania, eisini høvdu tikið lut í onkrari kapping ikki so langt undan landsliðsferðini í mars. Men um nøkur nytta skal vera í einum sovorðnum tiltaki, so er tað neyðugt, at allir teir spælararnir verða tøkir, sum vit ætla at brúka í landsdystunum. Tað verður torført, men vit mugu tosa um hetta.

Tíðindafólkini vildu hava føroyska venjaran at siga teimum, hvussu hann metti avrikið á einum stiga frá 0 til 10:

– Eitt tvey tal. Í 1. hálvleiki vóru vit hepnir, at teir ikki komu á odda. Um teir høvdu skorað, so høvdu fyritreytirnar verið øðrvísi í 2. hálvleiki. Vit vórðu betri í 2. hálvleiki, men hetta var avgjørt ikki nóg gott.

JH

# Vit eru ov bangnir

*Jens Martin Knudsen heldur, at tað er óneyðugt at hava so stóra virðing fyri smáu fótbóltstjóðunum*



*Maðurin við 50 landsdystum, Jens Martin Knudsen, heldur at føroyingar í nógv størri mun skulu megna at vera skapandi liðið*

Tað plagar at verða sagt, at teir, sum spæla jubileumsdyst, spæla illa. Mikukvøldið vardi Jens Martin Knudsen landsliðsmálið fyri 50. ferð. Hann spældi væl, og eingin ivi var um, at avrikið hjá honum var so nógv tað mest sannførandi hjá føroyingunum. Hann hevði ikki nógv at gera, men tvær ferðir vóru bjargingarnar fínar:

– Í fyrra førinum, sum var eitt fríspark úr vinstru, sá eg ikki bóltin, fyrrenn hann var komin inn um manngarðin hjá okkum. Har vóru fimm av okkara monnum og so tveir av teirra. Tíbetur eydnaðist tað at sláa bóltin út í hina síðuna.

Í seinna førinum – tað var í 2. hálvleiki – hekk málverjin uppi í horninum og bjargaði:

– Eg roknaði avgjørt við, at langskotið fór at verða sent móti handara horninum. Men í staðin fekk hann á ein ella annan hátt bóltin millum beinini á einum verjuspælara, og tá bólturin hevði kós móti nærra horninum, gjørdist tað hættisligt.

*Hví gongst tað ikki betur móti smáum tjóðum, enn tað ofta ger?*

– Eg haldi, at vit eru ov varnir. Vit spæla ikki meira álopskent móti teimum smáu, enn vit gera móti t.d. Russlandi. Tað haldi eg er skeivt. Vit skuldu havt fleiri álopsspælarar enn tveir, og vit áttu at trýst teir at gera mistøk longri frammi á vøllinum.

**Søplaðu**

Í 2. hálvleiki fingu føroysku spælararnir fleiri málmøguleikar. Uni Arge fekk einasta málið, tá hann í málteiginum var púra kaldur. Eitt sindur seinni fekk hann ein góðan møguleika:

– Eg hoyrdi Toda rópa, og so royndi eg at leggja tvørturum, men tíverri fekk málverjin knúgvarnar á.

– Men eg hevði tveir aðrar møguleikar, tá eg var einsamallur við málverjanum. Báðar ferðirnar átti eg at havt fingið mál. Hatta ber ikki til at renna undan, staðfesti Todi Jónsson.

Kurt Mørkøre fekk møguleikan í álopinum fyrsta lítla tíman, men tað hilnaðist ikki væl:

– Tað kom ongantíð so mikið langt, at spælið varð lagt til rættis, soleiðis at eg fekk bóltarnar í brotsteigin, og tí var tað væl skiljandi, at venjarin setti Una Arge inn, helt Kurt Mørkøre, sum í fimtan dystum fyri Sogndal í vár hevur skorað tíggju mál. Sunnudagin fóru teir í Sogndal undir landskappingina.

– Tað hevði verið ein ordiligur smeitur, um vit ikki høvdu vunnið á Liktinstein. Vit hava áður verið vónbrotnir móti smáum tjóðum. Eg haldi, at hetta tyngdi okkum eitt sindur. Men eg haldi eisini, at tað telur positiva vegin, at tað í 2. hálvleiki eydnaðist at fáa rætta endan, sjálvt um tað ikki hevði gingið væl í 1. hálvleiki. Hetta síðsta segði Jan Dam, sum var millum teir tryggastu.

JH



# Tað eru málini sum telja

*Týski venjarin hjá Liktinstein staðfesti, at hann hevði bara ein úrmæling á liðnum*

Venjarin hjá Liktinstein, týskarin Ralf Loose, er vanur at tapa. Men eftir tapið móti Føroyum mikukvøldið duldi hann ikki, at hann var ónøgdur við, at hansara menn høvdu tapt:

– Vit høvdu greiða yvirvág í 1. hálvleiki, og eg haldi ikki, at tað hevði verið ov mikið, um vit tá vóru framman fyri við tveimum málum. Men vit hava ein stóran trupulleika. Hann er, at vit fáa ikki mál burtur úr møguleikunum.

*Vart tú nøgdur við avrikið hjá tínum monnum?*

– Í 1. hálvleiki høvdu vit takið á spælinum. Men ein venjari er ikki nøgdur, tá liðið ikki skorar. Í 2. hálvleiki kom tað týðuliga til sjóndar, at mínir spælarar vóru verri fyri, enn mótstøðumenninir vóru. Tað var bara ein av mínum monnum, sum skaraði framúr. Eg haldi, at liðformaðurin hjá okkum, Mario Frick, var besti maður á vølli, men ein einsamallur maður kann ikki vinna ein landsdyst.

*Hvussu metir tú avrikið á einum stiga frá 0 til 10?*

– Eg eri samdur við Allani Simonsen í tvey talinum. Tað eri eg, sjálvt um okkara lið hevði takið í 1. hálvleiki. Teir megnaðu ikki at spæla seg til møguleikar, sum góvu mál, og tá teir gjørdu nógv mistøk, ber ikki til at geva teimum nakað serligt fyri avrikið.

JH



# Fyrsta málið í tíggju mánaðir

*Sigurin á Liktinstein var tann fyrsti í átjan dystum. Tríggjar ferðir á rað eru brotsspørkini misnýtt*

Sigursmálið, sum Uni Arge skoraði mikukvøldið, var sætta málið hjá honum. Tað fyrsta skoraði Uni fyri sjey árum síðani. Tað var í 3–1 tapinum á Kýprus flaggdagin í 1993.

Sigurin á Liktinstein var tann fyrsti í átjan dystum. 6. august í 1997 vunnu Føroyar 2–0 í vinadysti í Tartu í Estlandi. Undan mikukvøldinum var landsliðið í seytjan dystum á rað farið av vøllinum uttan at vinna. Fýra ferðir hevur tað verið javnleikur.

**Brotsparkini**

Øssur Hansen hevði ikki eydnuna við sær, tá hann fyri aðru ferð fekk møguleikan úr ellivu metrum. Fyrra ferðin, sum var á Malta 30. apríl í 1997, skoraði hann. Hesaferð sendi hann upp um málið.

Misnýtta brotssparkið var tað triðja misnýtta á rað. Allan Mørkøre misnýtti móti Íslandi í vinadystinum á Tórsvølli 18. august í fjør, og John Petersen misnýtti í EM undankappinardystinum móti Bosnia-Hersegovina á Svangaskarði 9. juni í fjør.

JH



*Uni Arge hevði enn einaferð orsøk til at fegnast um føroyskt mál saman við liðfeløgum*

# ÍSF einki at gera á Tórsvølli

*Heðin Mortensen tók seg úr nevndini fyri grunnin, tí hann helt ikki at nevndarsessurin tænti nøkrum endamáli*

JÁKUP MØRK

Um páskirnar frættist i útvarpinum, at Heðin Mortensen í næstum leggur fram uppskot um broyting í nevndarviðurskiftunum í Grunninum fyri Tórsvøll.

**Tænir ongum endamáli**

Undanfarna ár boðaði Heðin Mortensen frá, at hann segði nevndarsessin í tórsvallargrunninum frá sær.

Heðin greiðir frá, at orsøkin til hetta var tann, at hann ikki sá nakra nyttu í at sita í nevndina vegna ÍSF.

Hann sigur at tórsvallarverkætlanin var ætla at tæana allari ítróttini, men at hetta nú er broytt, so hon í dag bert tænir fótbóltsligu endamálunum. Tí metir nevndin hjá ÍSF ikki, at felagsskapurin eigur at hava ein aktivan leiklut í hesum máli.

Tískil hevur Heðin Mortensen nú skotið upp, at nevndin verður víðkað upp í fimm limir, soleiðis at í hansara stað fáa HB og B36 eitt nevndarumboð í part, og at nevndin tá skal skipa seg sjálva.

**Ikki givið upp**

Í stuttari viðmerking sigur Heðin Mortensen, at hetta ikki skal skiljast soleiðis, at hann nú hevur mist alla vón um at gera Tórsvøll til landsstadion.

- Eg farið framvegis at virka fyri ger av rennibreyt á Tórsvølli, men hetta verður sum býráðslimur, sigur Heðin Mortensen at enda.



*Heðin Mortensen metir ikki, at ÍSF hevur nakað at gera í tórsvallarverkætlanini, sum støðan er*

# Óli valdi TB

*Tað gjørdist barndómsfelagið, TB, sum vann kapprenningina um landsliðsleikaran, Óla Johannesen*

JÁKUP MØRK

Danska Ekstra-Bladet skrivar í dag, at AGF fram til summarsteðgin lænir Óla Johannsen til TB. Leigumálið fær gildi beinanvegin.

**Aftur til røturnar**

Sostatt tykist nú greitt, at tað gjørdist barndómsfelagið TB, og ikki GÍ, sum komandi mánaðarnir fáa gleði av fótbóltsevnunum hjá landsliðsleikaranum.

Óli spældi í TB fram til 1996, tá hann gjørdi av at fara til B36 at spæla. Hetta samstundis sum hann var farin undir lestur á Læraraskúlanum.

Við B36 gjørdist hann føroyameistari í 1997, men árið eftir gekk leiðin heim aftur til Tvøroyri, har hann leikti fram til summarið 1999, tá hann og AGF komu ásamt um at gera sáttmála.

Okkum eydnaðist ikki at fáa fatur á Óla Johannesen áðrenn blaðið fór til prentingar.